# Eitt strævið ár

**Eftir hópin av heiðursmerkjum í bestu deildini, mátti Jákup Eli Olsen saman við liðfeløgunum ásanna, at fyrsta deild fyribils er eitt liðugt kapittul í B68-søguni**

NIÐURFLYTING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein av teimum heilt royndu hjá B36 er Jákup Eli Hansen. Hann hevur í eini 15 ár verið ein av teimum, sum roknað hevur verið við á Toftum, tó at hann okkurt árið hevur roynt seg aðrastaðni eisini.

Fyri tað nógva hava hesi árini snúð seg um heiðursmerkjastríð og europeiskar uppgávur, men árið í ár hevur verið heilt øðrvísi í so máta. Og sjálvur dylir Jákup Eli ikki fyri, at hetta hevur verið tungt.

– Tað hevur verið ræðuliga strævið. Tí vit hava alla tíðina havt mótburð. Í so máta haldi eg ikki, at dysturin í dag var nakað sum helst at tosa um. Hjá okkum var alt liðugt seinasta mánakvøld, og so kundi dagurin í dag gera tað sama, heldur hann.

Seinasta mánakvøld var Jákup Eli annars ikki á liðnum, orsakað av leikbanni. Men eitt ár er aftur næsta ár, og tá vit sunnudagin spurdu Jákup Eli, hvørt hann aftur tá fer at taka eitt tak fyri B68, tykist hetta í øllum førum ikki ógjørligt.

– Høvdu vit ikki farið niður, so hevði eg heilt víst givist, men nú fáa vit at síggja. Tað er long tíð til februar mánað, so tað kann vera, at hugurin er komin aftur.

– Sjálvur ivist eg í øllum førum ikki í, at B68 hoyrir heima í fyrstu deild, og tað fer at koma sera óvart á meg, um felagið ikki hevur endurvunnið sessin um eitt ár, heldur hann at enda.



*Hjá okkum var alt liðugt seinasta mánakvøld, og so kundi dagurin í dag gera tað sama, segði Jákup Eli Olsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

B36-B68 6-2 (2-0):

# Endaðu við málveitslu

**Lágur intensitetur og nógv mál var uppskriftin í Gundadali, har árstalsfeløgini bæði, B36 og B68 takkaðu fyri seg**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað gek næstan soleiðis, sum roknast kundi við í seinasta fyrstudeildardystinum í Gundadali hetta kappingarárið. B68 var longu farið í aðru deild undan dystinum, og fyri teirra viðkomandi var hesin dysturin tí bara nakað, sum skuldi fáast frá hondini, og hjá heimaliðnum vóru silvurmerkini somuleiðis staðfest, so heldur ikki har var tað stóra at rafla um.

Hjá vertunum hevði venjarin tí eisini gjørt av, at hetta skuldi verða møguleikin hjá fleiri av yngru leikarunum í felagnum, og saman við Bergi Midjord, sum veruliga hevur vunnið sær fast pláss seinastu dystirnar, vóru blaðungu Johan V. Gunnarsson og Leiv Hansen eisini í byrjunaruppstillingini.

Og saman við restini av liðnum fingu teir báðir so eisini eina lítla succes-uppliving í hesum seinasta dystinum. Talan var ongantíð um nakra høga ferð á spælinum, og tí kundu leikararnir sjálvir fyri tað mesta fylgja við, og leysu markeringarnar førdu so eisini við sær, at møguleikarnir gjørdust heilt nógvir í tali.

Eftir at Allan Mørkøre við einum avrættaðum frísparki og Levi Hanssen eftir kanska besta álop í dystinum høvdu skotið B36 framum undan steðginum, tóktist alt at vera avgjørt, og í seinna hálvleiki fóru málini so av álvara at skola inn. Allan økti til 3-0 við enn einum frísparki, sum tó einki hevði við hepni at gera hesaferð, og Meinhard í B68-málinum var prísgivin við bæði 4- og 5-0 málið, sum vóru skotin úr stuttari fjarstøðu. Seinasta B68 málið má málverjin tó taka á sín kappa, og so tóktist eina løtu, sum vildu allir á B36-liðnum skora.

Tað gjørdust tó gestirnir, sum skutu tey bæði seinastu málini, men hvørki skotperlan hjá Ronnie Svalbard ella tað, sum væl kann seg sum seinasta fyrstudeildarmálið hjá Øssuri Hansen, var tó nakað, sum kundi fáa fagnaðin fram í Toftamonnum. Teir vistu longu av, at hetta var teirra svanasongur á hesum sinni, og tað skiltist eisini á øllum brøgdum, tá dysturin var av. Leikararnir vórðu fyri tað mesta bara standandi við skiftisbeinkin. Ivaleyst grunaðu teir um, hvat kundi verið gjørt øðrvísi í ár, men farið er farið, og eisini á Toftum ræður um at líta frameftir.

B36 kundi so í sín part fáa silvurmerkini handað, og tó at hetta var eitt sindur minni, enn teir høvdu ætlað undan árinum, so er tað betri enn einki, og gevur í øllum førum rætt til europeiskan fótbólt komandi ár. Tá verður tað so uttan fleiri av teimum, sum seinnu árini hava gjørt um seg í felagnum, men onkrar ungar kreftir standa tó til reiðar at taka við, og so er spurningurin, hvussu hesir fara at roynast.



*So var liðugt. B68 leikti seinasta fyrstudeildardystin á hesum sinni leygardani, og andlitsbráðini á leikarunum kunnu neyvan misskiljast*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## FAKTA UM DYSTIN

**B36-B68 6-2 (2-0)**
1-0: Allan Mørkøre, 27.
2-0: Levi Hanssen, 45.
3-0: Allan Mørkøre, 56.
4-0: Alex dos Santos, 67.
5-0: Egil á Bø, 76.
6-0: Jóhannis Joensen, 78.
6-1: Ronnie Svalbard, 80.
6-2: Øssur Hansen, 89.
**B36:** Magnus E. Poulsen – Allan Mørkøre, Jóhannis Joensen, Pól Thorsteinsson, Jens Kristian Hansen – Bergur Midjord, Klæmint Matras, Ronnie Samuelsen, Johan V. Gunnarsson – Levi Hanssen, John Petersen
**B68:** Meinhardt Joensen – Oleif Joensen, Herbert í Lon Jacobsen, Bogi Petersen , Jákup Eli Olsen – Stanislav Stankov, Mikkjal Thomassen, Øssur Hansen, Fabricio – Jóhan Petur Poulsen, Kristian Anton Andreasen
**Dómari:** Oddmar Andreasen. Kundi eins og spælararnir taka sær av løttum, nú alt kortini var avgjørt.

# Veteranurin takkar fyri seg

**Eftir 15 ár á besta B36-liðnum takkar Jens Kristian Hansen nú fyri seg**

FARVÆL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á verandi B36 liðnum er helst eingin ivi um, at leikarin, sum hevur roynt felagnum drúgvastur, er Jens Kristian Hansen.

Síðani fyrsta dystin fyri besta mansliðið hjá felagnum afturi í 1990, hevur hann verið fastur fúsur. Eitt árið var hann tó á skúla í Danmark, men eisini tá var hann heima onkran dystin, og tá skaðar ikki hava steðgað honum, hevur hann vanliga talst millum fyrstu ellivu, eins og hann gjørdi tað á landsliðnum í drúgt áramál.

Nú er hetta tó søga, tí dysturin móti B68 var tann seinasti hjá Jens Kristiani fyri besta B36-liðið. Tað sigst annars, at orsøkin til, at hann ikki fekk nakra gávu undan dystinum hesaferð var, at tey í leiðsluni vóna, at hann kortini tekur eitt ár afturat, men sjálvur tykist leikarin ivaleysur.

– Nei. Eg gevist nú. Eg havi hugsað um tað fyrr, men hesaferð eri eg heilt vísur. Eg havi egið virki, hús, konu og trý børn at hugsa um, og tá verður tað sera møtumikið at lata tað, sum krevst til fyrstudeildarfótbólt. Eisini hava skaðarnir verið nógvir seinastu tíðina, og tað betrar so heldur ikki um hugin, sigur hann.

Tvær ferðir hevur Jens Kristian verið við til at vinna gull fyri felagið, men seinasta árið endaði so við silvuri, men sum hann tekur til, so fekk tað nú ikki verið so nógv øðrvísi.

Og hann leggur dent á, at hóast B36 nú tvær ferðir í slag hava verið ov stuttir mótvegis HB, so hevur tíðin í fyrstu deild givið nógv góð minni.

– Fyrst og fremst minnist man sjálvandi árini, tá meistaraheitini eru vunnin. Tað hevur verið heilt fantastiskt, men hinvegin telja so tær ferðirnar, tá tú akkurát hevur verið ov stuttur. Ikki minst í 1991, tá vit leingi vóru fremstir, fyri kortini at missa alt. Tað var ikki serliga hugaligt.

Og at enda spurdu vit Jens Kristian, hvørt hann ikki roknaði við, at hann fór at sakna tilveruna í fyrstu deild, nú hann hevur tikið avgerð um at steðga.

– Nei. Tað haldi eg ikki. Eg var nógv skaddur í ár, og hesaferð tráðaði eg als ikki á sama hátt sum vant, eftir at sleppa á vøllin aftur. Tí er tíðín kanska komin at gevast, og heilt burtur frá fótbóltinum verður tað so heldur ikki, sigur hann.

Við hesum seinasta sipar hann til, at tað framyvir verður á fjórðu deildarliðnum hjá B36, at hann fer at royna seg saman við øðrum gomlum fyrstudeildarkempum í felagnum. Eitt nú stórabeiggjanum, Tummas Eli Hansen.



*Framhald av síðu 16*

at skipa soleiðis fyri, at vit sum frálíður fáa alt fleiri vinnugreinar at dúva uppá, og soleiðis at minka um sveiggini í føroyska búskapinum. Vísandi til gongdina í tænastu-vinnunum, so eru vit á leiðini nú.

Eitt annað av stevnumiðunum er eisini at skapa umhvørvi í Føroyum, so at ungu fólkini støðast og annars koma aftur higar aftaná lokna útbúgving uttanlands.

Eisini at draga útlendingar higar - íleggjarar, sum kunnu margfalda samfelagið.

Ein vinnugreinin, sum kastar nógv av sær og ríkar lívið hjá okkum, ja, er sum balsam á sálina strongdu gerandisdagarnar, er tónleikurin. Nógvastaðni er tónleikurin nú týðandi vinnugrein.

Talan er eisini um ótømandi potentiali, har tað eru bert karmarnir og hugflogið, sum seta mørkini. Hinvegin er tónleikavinnan sera óforudsigilig. Ja, so deiliga trupul at stýra. Livir sítt egna lív,
- har eftirspurningurin er aðalreglan,
- har marknaðarkrefturnar hava valdið,
- har kreativiteturin er grundvøllurin.

Kanska ikki vinna fyri trygdarnarkomanar

Samanlagt ein vinna við avbjóðingum og so sanniliga eisini við møguleikum. Har tey skapandi og váðafýsnu kenna seg sum fiskurin í sjónum. Har succes'in tølir og altíð hómast handan sýnina.

Ein vinna sum kavabólturin. Farin á rull, so vindur hon uppá seg, er sjálvforstyrkjandi.

Tónleikalívið í Føroyum hevur ment seg nógv seinnu árini, og er hetta orsakað av fleiri viðurskiftum, kanska einmest orsakað av musikskúlanum.

Tað er umráðandi at arbeiða víðari við menningini, og frøast vit tí um, at Vinnuframagrunnurin, Menningarstovan og Mentamálaráðið hava tikið stig til hetta tónleikaseminar, sum hevur til endamáls at lýsa, hvat skal til fyri at gera tónleikin til ein vinnuveg.

Vit eru vælsignað við sera gávaðum tónleikafólkum. Kann nevna okkara kendu Eivør og Teitur, sum eru komin rættuliga langt uttanfyri landoddarnar, mestsum uttan almenna hjálp.

Nú bíða vit eftir "hittinum", sum setir okkum á heimskortið, soleiðis sum fótbóltslandsliðið megnaði við ógloymandi dystinum í Landskrona á sinni.

### What does it take - hvat krevst?

Vit eiga talentini, spurningurin er, hvussu vit samansjóða kreativu orkuna. Skapa møguleikarnar. Fremja sambondini við umheimin. Vónandi frætta vit okkurt um tað í dag.

Alheims brúkarin leitar eftir tí originala, eftir serligu vørunum, sum hann fegin vil ogna sær. Vørum, sum hann fegin stendur í kø fyri at fáa hendur á.

Nútíðar marknaðarføring elur fram áhuga fyri serstøku produktunum. Skapar forvitni og hug at keypa. Marknaðarføringin er altjóða. Produktini eru brúkarunum í hendi ofta samstundis worldwide.

Hetta gevur møguleikar, og kann eisini vera okkara styrki, duga vit nýta teir.

Sum sagt, so eiga vit talentini, vit hava rávøruna til serstøku vøruna. Bólturin liggur á okkara hálvu. Vit skulu gera sum í Landskrona. Skora á hinu hálvuni. Skapa sensatiónina. Hetta er tað sum er í sjónarringinum. Vit eiga at taka saman hendur og bróta úr nýggjum.

Tí er hetta tiltakið sera áhugavert, ja slóðbrótandi. Spennandi verður at síggja, hvat kemur burturúr. Vænti, at vit øll fara at læra av degnum og at slóðað verður fyri hugskotum og soleiðis menning á tónleikaøkinum.

Vænti eisini, at dagurin fer at geva íblástur til, hvussu vit skulu skipa okkum á vinnuframaøkinum, soleiðis at komandi tónleikavinnan fær so góðar karmar virka innan fyri sum tilber.

Fari at takka stigtakarunum fyri tiltakið við ynski um góðan og gevandi dag, og verður øllum ynskt góða eydnu við tiltakinum. Við hesum fáau orðum er tónleikaseminariið sett segði landsstýrismaðurin.

# Fyribilsleiðari í Listaskálanum settur



*Inger Smærup Sørensen her avmyndað saman við Amariel Norðoy, tá hon var til upplatingina av framsýningini hjá honum í Glarsmiðjuni*

*Mynd : Jan Müller*

Nevndin í Listaskálanum hevur gjørt av at seta Inger Smærup Sørensen sum fyribils leiðara í Listaskálanum fram til nýggjárs.

Hon tekur við eftir, at Mathea Hilduberg, sum varð sett í juli í ár, í seinastu viku fór úr starvinum.

Helgi Fossádal, nevndarlimur, sigur, at nevndin fer at nýta hesa tíðina frá nú av fram til ársskiftið at koma til eina endaliga avgerð um, hvat skal gerast.

Inger Smærup Sørensen var listaliðleiðari í Listaskálanum, áðrenn hon varð sett sum fyribilsleiðari.


## EVNISDAGUR UM RÆTTINDI HJÁ BREKAÐUM

Týsdagin 5. oktober kl. 13.00 verður ein evnisdagur í Norðurlandahúsinum um rættindi hjá brekaðum.
Á evnisdegnum verður ein røð av fyrilestrum og framløgum um støðuna hjá fólki, ið bera brek, sum samfelagsborgarar.

**Tiltakið er alment, og luttøkan er ókeypis.**

Teknmálstulkar tulka tað, sum verður sagt.

Bjørt Samuelsen, fjølmiðlakvinna, stýrir degnum og tekur samanum.

**Skráin fyri evnisdagin er hendan:**
Kl. 13.00: Doris Hansen, formaður í stýrisbólkinum fyri Ár teirra brekaðu, bjóðar vælkomin.
Kl. 13.05: Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, setur dagin.
Kl. 13.15: Leila Solmunde, formaður í MBF: Handikap-politikkur er samfelagspolitikkur.
Kl. 13.30: Lars Ødegård, aðalskrivari í Norges Handikapforbund: Funktionshæmmedes ligerettigheder - et spørgsmål om patologi eller politik?
Kl. 14.20: Steðgur. Høvi er at síggja framsýning um atkomuviðurskifti í forhøllini. Hjálpitólamiðstøðin og MBF skipa fyri.
Kl. 14.50: Marjun Bæk, prestur: "..eg havi einki menniskja.."(Luk 5,7). Hugleiðing.
Kl. 15.25: Halgir Winther Poulsen, sakførari: Fevna mannarættindi um brekað-rættindi?
Kl. 16.00: Bjørt Samuelsen tekur samanum.
Kl. 16.15: Dagurin endar.



**Tað er stýrisbólkurin fyri Ár teirra brekaðu 2003, sum saman við Almanna- og heilsumálaráðnum skipar fyri tiltakinum.**